# Elton John bíðaði til fánýtis

Songkvinnan Amy Winehouse var somikið vónbrotin eftir at tað var liðugt millum hana og sjeikin Alex Claire, at hon fór at drekka. Hetta merkti, at 23 ára gamla Amy mátti avlýsa tvær konsertir. Tíanverri fyri songkvinnuna, ið arbeiðir hart fyri at fáa sítt stóra gjøgnumbrot í USA, var ein av konsertunum, ein konsert fyri innbodnum, har nógv kend fólk vóru komin at lurta m. o. Sir Elton John, skrivar eb.dk. Men man Elton John ikki hava avlýst bæði eina og tvær konsertir í sínum ungu meira lívligu døgum, so hann eigur ivaleyst ikki at vera alt ov illur um, at hann møtti upp til onga nyttu. Sambært pápa Amy, verður hon nú send til avrúsan.





## HITLIST

### 15 tær bestu (ÚF)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Boys In A Band | Super Contagious |
| 2 | Sic | To Dare To Risk To Regret |
| 3 | Nephew | Science Fiction og Familjen |
| 4 | My Chemical Romance | Famous Last Words |
| 5 | Rasmus Rasmussen | Edelweiss |
| 6 | Red Hot Chili Peppers | Snow (Hey Oh) |
| 7 | Nelly Furtado | All Good Things (Come To An End) |
| 8 | Gwen Stefani ft. Akon | The Sweet Escape |
| 9 | Fall Out Boy | This Ain't a Scene, It's an Arms Race Video |
| 10 | Justin Timberlake | What Goes Around Comes Around |
| 11 | U2 | Window In The Skies |
| 12 | Kristleif Zachariassen | Flowerplayer |
| 13 | Mika | Grace Kelly |
| 14 | Timbaland feat. Nelly Furtado & Justin Timberlake | Give It To Me |
| 15 | The Fray | How To Save A Life |

### Eykaløg

| | |
|---|---|
| Naturally 7 | Feel It |
| Muse | Invisible |
| Take That | Shine |
| Robbie Williams | Bongo Bong And Je Ne T'Aime Plus |
| Páll Finnur Páll | Mín Russiski Vinur |

### Tjeklisten (DR)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Nelly Furtado | All Good Things (Come To An End) |
| 2 | Nephew | Science Fiction og Familjen |
| 3 | Infernal | Won't Be Crying |
| 4 | Mika | Grace Kelly |
| 5 | Robbie Williams with Pet Shop Boys | She's Madonna |
| 6 | Killers | Bones |
| 7 | DQ | Drama Queen |
| 8 | Razorlight | America |
| 9 | Chris Cornell | You Know My Name |
| 10 | Dúné | Bloodlines |
| 11 | Nik & Jay | I Love Ya |
| 12 | Take That | Patience |
| 13 | Akon ft. Snoop | Dogg I Wanna Love You |
| 14 | Julie | Take Me Away |
| 15 | Anders og Ricky | Nik & Jay Kompot |
| 16 | Volbeat | The Gardens Tale |
| 17 | Rasmus Nøhr | Ring Nu |
| 18 | My Chemical Romance | Famous Last Words |
| 19 | Red Hot Chili Peppers | Desecration Smile |
| 20 | Simone | As If |

### Top of the Pops (BBC)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Take That | Shine |
| 2 | Gwen Steffani ft. Akon | The Sweet Escape |
| 3 | Kaiser Chiefs | Ruby |
| 4 | Justin Timberlake | What Goes Around Comes Around |
| 5 | The Fray | How To Save A Life |
| 6 | Mika | Grace Kelly |
| 7 | Camille Jones /fedde Le Grand | The Creeps |
| 8 | Kelis ft. Cee-lo | Lil Star |
| 9 | Gossip | Standing In The Way Of Control |
| 10 | Nelly Furtado | Say It Right |
| 11 | Cascada | Miracle |
| 12 | Akon feat. Snoop Dogg | I Wanna Love You |
| 13 | Biffy Clyro | Saturday Superhouse |
| 14 | Omarion | Ice Box |
| 15 | Lily Allen | Alfie/Shame For You |
| 16 | Robbie Williams with Pet Shop Boys | She's Madonna |
| 17 | Calvin Harris | Acceptable In The 80s |
| 18 | Just Jack | Starz In Their Eyes |
| 19 | Fall Out Boy | This Ain't a Scene, It's an Arms Race Video |
| 20 | Take That | Patience |

### Billboard

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Mims | This Is Why I'm Hot |
| 2 | Akon | Don't Matter |
| 3 | Gwen Stefani ft. Akon | The Sweet Escape |
| 4 | Justin Timberlake | What Goes Around Comes Around |
| 5 | Avril Lavigne | Girlfriend |
| 6 | Fall Out Boy | This Ain't a Scene, It's an Arms Race Video |
| 7 | Gym Class Heroes Ft. Patrick Stump | Cupid's Chokehold |
| 8 | Fergie ft. Ludacris | Glamorous |
| 9 | RIhanna & Sean Paul | Break It Off |
| 10 | Nelly Furtado | Say It Right |
| 11 | Daughtry | It's Not OVer |
| 12 | Ludacris ft. Mary J. Blige | Runaway Love |
| 13 | Beyoncé | Irreplaceable |
| 14 | Omarion | Ice Box |
| 15 | Lloyd ft. Lil Wayne | You |
| 16 | Robin Thicke | Lost Without U |
| 17 | Fat Joe fr. Lil Wayne | Make It Rain |
| 18 | Unk | Walk It Out |
| 19 | Dixie Chicks | Not Ready To Make Nice |
| 20 | Pretty Ricky | On The Hotline |

sound



# Lily Allen hevnir seg

Lily Allen hevur sambært The Sun veruliga fingið hevnt seg inn á fyrrverandi sjeikin og plátuvendaran Lester Lloyd, ið eftir at hava gjørt tað liðugt, seldi søgu sína til eitt dagblað.

Lily Allen sigur við The Sun, at hann var hennara fyrsti kærleiki, og tí nakað heilt serligt, og at hetta gjørdi tað uppaftur verri at lesa í dagbløðunum.

Hon hevndi seg tí við at skriva ein ljótan sang um fyrrverandi sjeikin, hennara hittlag Smile, síðan fór hon í song við øllum vinmonnum hansara, greiður hon frá í blaðnum.

# Johnny Depp rýmdi av filmsettinum



Johnny Depp var í ferð við at taka upp filmin Sweeney Todd, tá sjey ára gamla dóttur hansara Lily-Rose var løgd inn á sjúkrahús. Depp fór beint av filmsettinum, og til sjúkraleguna hjá dóttir sínum, hetta var fyri tveimum vikum síðan. Síðan tá hevur filmsliðið arbeitt rundan um stjørnuna, og filma teir partarnir har hann ikki luttekur, men nú byrjar hesar senurnar at ganga undan. Men Depp sigur, at hann víkur ikki frá liðini á dóttur síni, fyrr enn hon er vorðin frísk aftur. Hetta hevur fingið filmstjóran at boða starvsfólkinum í Pinewood Studios, at tey verða koyrd í vikuskiftinum, um Depp ikki er komin afturíaftur. Ætlanin er tó, at seta øll í starv aftur, tá Lily-Rose er vorðin frísk, skrivar The Sun.



# Sylvester Stallone ákærdur fyri smugling

Sylvester Stallone hevur í síni tíð bæði spælt fangi og politistur, men nú hevur hann eisini uppliva, at verða handtikin, filmstjørnan sleppur tó frá at royna veruliga lívið handan rimarnar. Í sambandi við frumsýningina av nýggjasta filminum hjá Sylvester Stallone Rocky Balboa, varð hann tikin í tollinum, fyri at smugla 48 eindir av vakstrarhormonir av menniskjum. Hetta er doping, ið er forboðið í nærum øllum ítróttargreinum, og forboðið at hava við sær til Avstralia.

Lógarbrotið er tó ikki meira ólógligt, enn at størsta revsingin er £50.000. Rættarmálið byrjar 24. apríl, skrivar The Sun.